# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Pætur Franklin Sørensen 95 ár

Í dag, fríggjadagin 14. januar, verður Pætur Franklin Sørensen í Klaksvík 95 ár. Síðani 1996 hevur Pætur Franklin búð á Vistarheiminum, men hann er framvegis rættuliga birgur, og føðingardagurin verður hildin hjá dóttrini og versoninum - Birnu og Jógvani Ravnsfjall.

Pætur Franklin er fugloyingur og ættaður av Kirkju. Foreldrini vóru Sørin Pram Zachariasen úr húsinum har Norð á Kirkju og Sunneva, sum var fødd Eliasen og ættað úr Kelduhúsinum í Hattarvík. Tey giftust í 1893 og átta børn komu undan, sum høvdu Sørensen til eftirnavn: Zacharias, Sigga, Signa, Eliesar, Líggjas, Mourits, Pætur Franklin og Betta. Zacharias búði í Havnini, Sigga, Signa og Mourits á Kirkju og Eliesar, Líggjas, Betta og Pætur Franklin í Klaksvík. Eftir á lívi eru Mourits, Eliesar og Pætur Franklin. Lauga og tann fyrri Mourits vóru børn, tá ið tey doyðu.



Pætur Franklin var fjúrtan ára gamalur, tá ið hann fór til skips. Fyrsti kjansurin var við Ternuni, sum var lítil slupp hjá teimum hjá Havna Jógvani í Norðdepli. Sámal Christiansen førdi hana. Pætur Franklin sigldi nógv av sínum bestu árum, og hansara partur lá ikki eftir. Millum skipararnar, sum hann tíðliga í tíðini var við, var Eliesar Sørensen, bróður hansara.

Í februar 1931 leyk Pætur Franklin skiparaprógv í Havnini, og í februar 1938 tók hann longdina í Havnini. Í 1934 fór hann við Carlton sum 2. bestimaður, og frá 1936 og næstu tjúgu árini var hann bestimaður við Viðoy. Í seksti árunum arbeiddi hann eitt skifti á Snørisvirkinum hjá Sámali Thorsteinsson, men tá ið flakatrolararnir hjá Kjølbro komu, legði hann aftur til brots, og Pætur Franklin fór ikki í land av Skálabergi fyrrenn í 1982, tá ið hann var 72 ára gamalur. Tá setti hann seg tó ikki fyri einki. Hann fór á Kósina at arbeiða, og har var hann, inntil hann var farin um tey áttati.

Pætur Franklin giftist 20. januar í 1942 við Hjørdis, fødd Guttesen í 1916, og ættað úr Skopun. Foreldrini hjá henni vóru Ragnhild og Julius Guttesen. Hon var úr Skopun, og hann var ættaður úr Kirkjubø og uppvaksin í Skopun. Ragnhild og Pætur Franklin búsettust á Stongunum í Klaksvík, og har búðu tey øll árini, sum tey fingu at liva saman. Hjørdis doyði 5. apríl í 1992, og í 1996 fór Pætur Franklin á Vistarheimið, sum er í húsunum, sum Evald Kjølbro, sáli, átti á Biskupsstøð.

Tað kann ikki sigast annað, enn at Sørensen systkini rættuliga hava verið við til at seta dám á Vistarheimið. Sigga búði síni síðstu ár har, og nú eru Mourits, sum næstan er 97, og Pætur Franklin har. Eliesar, sum gongur á 100. ári, vitjar á Vistarheiminum hvørt hóskvøld. Allir tríggir beiggjarnir minnast væl, og tá ið teir duga væl at siga frá, sigur tað seg sjálvt, at tað er áhugavert at sita undir.

Hjørdis og Pætur Franklin eiga tríggjar døtrar: Sunnuva, f. 1943, býr í Havnini, Ragnhild, fødd 1946, býr í Keypmannahavn, og Birna, fødd 1950, býr í Klaksvík. Pætur Franklin eigur átta abbabørn, og tað er farið at leggjast afturat í triðja ættarliðnum.

## Tøkk

Hjartans takk til tykkum øll, sum gleddu meg og gjørdu mær 90 ára dagin ógloymandi. Serstøk tøkk til "Ljóm" fyri vakrar sangir og FSF fyri gávu og heilsan.

Blíðar heilsanir við ynskjum um vælsignað nýggjár.

**Anna hjá John**

## Tøkk

Eina hjartans tøkk veita vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust mammu, ommu og langommu okkara

**Giggu við Keldu**

nú hon andaðist og varð løgd til hvíldar.

*Familjunnar vegna*

**Regin, Jógvan og Ásla**

## Hjørleif Waag Høgnesen 80 ár

Í gjár, hósdagin 13. januar, fór Hjørleif Waag Høgnesen í Klaksvík um tey áttati. Tað ber ongum til at renna undan aldrinum - heldur ikki Hjørleifi. Men hóast hann nú hevur nátt markið, sum Skriftin sigur bara er tillutað kempunum, so hevur hann ikki tikið frá. Hjørleif røkir framvegis arbeiðið og álitissessirnar, sum hann so trúfastur hevur havt í mong ár. Hann hevur verið organistur í Christianskirkjuni í fleiri enn 30 ár, og tað er hann framvegis. Hann hevur verið organistur í Emmaus so leingi, sum nakar veit um at siga, og tað er hann framvegis, og saman við Tórgerð rekur hann matvøruhandilin á Vágsheygnum, sum tey hava havt í fleiri enn tríati ár.



Hjørleif er klaksvíkingur, og hann hevur alla sína tíð búð á Vágsheygnum. Av oman fyri standandi er skjótt at staðfesta, at eitt av eyðkennunum hjá honum hevur verið trúfesti. Hjørleif var lítil smádrongur, tá ið hann misti pápan, Jóan Magnus, sum fórst við Ernstinu. Mamman, Turid, og Hjørleif búðu undir sama taki, inntil hon doyði. Seinni tóku Hjørleif og konan, Tórgerð, sum hann heldur so ógvuliga nógv av, foreldur hennara til sín, og har vóru tey, inntil teirra tíð var liðug.

Tórgerð og Hjørleif hildu gullbrúdleyp í november. Tað gjørdu tey saman við børnunum - Turið, Eyð, Lív og Leif - sum øll búgva í Klaksvík. Tað var hugaligt at staðfesta, at familjukærleikin, fyrikomiligheitin og hjartalagið sóust aftur henda dagin í stóra flokkinum, sum møtti í kirkjukjallaranum fyri at heiðra tey bæði og gleðast saman við teimum.

Á ungum árum arbeiddi Hjørleif hjá mammubeiggjanum, Einari Waag, har hann var bilførari. Seinni fór hann undir egið virksemi, og eitt langt skifti mundi hann teljast millum teirra í Klaksvík, sum høvdu flest fólk í arbeiði. Hjørleif hevði bilstøð, hann átti sjálvur nógvar hýruvognar og buss, sum koyrdi runt vánna, og seinni hevði hann bilverkstað, har bæði bilar hjá honum og øðrum vórðu umvældir.

Hetta seinasta árið hava fleiri stórir dagar verið í familjuni, og fleiri ferðir hava høvi verið at gleðst saman við Hjørleifi og hansara. 80 ára dagurin í gjár varð hildin heima hjá einari av døtrunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu okkum og sýndu okkum samkenslu, tá elskaða kona, mamma, vermamma, omma og dóttir okkara

**Kára Djurhuus**
**Toftir**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar, gávur og heilsanir. Tøkk til prestar, kirkjutænarar, sangarar og øll tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað, og tøkk til øll tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við ervinum.

Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum fyri dyggan stuðul og umsorgan í hennaru sváru tíð.

*Fyri tey avvarðandi*

**Sigmund,**
**Bjørg, Jákup, Sheila og Uni**

**Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin**

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**

## Jarðarferð

**Magda Bjarnastein**

fer til gravar úr Fuglafjarðar kirkju fríggjadagin 14. januar kl. 13.00.

Tey, sum vilja lata blómur ella krans, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til sambýlið Vesturstovu í Fuglafirði